Meinhard St.John

# HUGBURÐUR ER TAÐ MEST SKAÐILIGA

– Børn eru ikki fødd við einari fatan av, hvør liviháttur er rættur ella skeivur. Tað er bara hugburður hjá nærumhvørvinum, sum ger av, hvat børn uppliva sum rætt og skeivt. Her í California er tað eingin sum heldur tað løgið, at sonur mín Liam hevur tveir pápar, sigur hoyvíkingurin Meinhard St.John, sum flutti av landinum sum blaðungur millum annað orsaka av sínari seksuellari sannføring

BARBARA HOLM

Eg fylgdi væl við í orðaskiftinum har heima, hóast tíðarmunurin gjørdi tað trupult«. Orðini eigur 43 ára gamli sjónleikarin Meinhard St.John, sum í San Francisco í California sat við telduni og fylgdi við í orðaskiftinum, tá ið hjúnabandslógin hevur verið til viðgerðar í Løgtinginum. Og sum vera man var fagnaðurin stórur, tá ið úrslitið gjørdist endaligt.

Fyri Meinhard St.John, amerikanska mann hansara Paul og lítla sonin Liam hevur tað jú týdning, at heimlandið góðtekur samkyndleika og harvið eisini hjúnabandi hjá Meinhard.

– Nú sær út til, at samfelagið er broytt har heima. Eg vóni tað veruliga, tí tað hevur ikki altíð verið lætt, sigur Meinhard St.John.

Sum 21 ára gamal fór Meinhard av landinum. Orsøkirnar vóru nógvar. Millum annað hevur Meinhard altíð havt ein útlongsul og á ungum árum hugsaði hann nógv um, at heimurin mátti hava meira at bjóða uppá enn bara Føroyar. Men ein orsøk var eisini, at Meinhard ikki kendi tað møguligt at liva sum samkyndur í heimlandinum.

*»Eg haldi hendan lógin hevur so ómetaliga stóran týdning, tí tá eg búði í Føroyum var tað jú fjalt, at nakrir føroyingar vóru samkyndir. Tú kundi ikki vera opin um tað tá«*

*Meinhard St.John*

### Hevði neyvan torað at komið út í Føroyum

Í síðstu viku vaknaði Meinhard St.John til eini gleðiboð. Tíðindini úr Føroyum vóru, at nú var meiriluti fyri at broyta hjúnabandslógina so, at tvey av sama kyni kunnu ganga saman í borgarligt hjúnarlag.

– Eg haldi hendan lógin hevur so ómetaliga stóran týdning, tí tá eg búði í Føroyum var tað jú fjalt, at nakrir føroyingar vóru samkyndir. Tú kundi ikki vera opin um tað tá, sigur Meinhard St.John.

Føroyska samfelagið var ikki til reiðar at kjakast um og góðtaka samkyndleika í 90'unum, og tað hevði eina sera stóra ávirkan á hendan samfelagsbólkin.

*Framhald á næstu síðu*



Her siggjast Meinhard St. John vinstrumegin, sonurin Liam og maður Meinhard, Paul St.John høgrumegin

PRIVATMYND

*»Liam er ein púra avbalanseraður og fittur drongur. Vit ganga við honum til fótbólt og svimjing. Vit eru til foreldrafundir, vit eru í kirkju hvønn sunnudag, vit eru á allar mátar eins og øll onnur. Og sonur okkara er sera væl fungerandi«*

*Meinhard St.John*



– Tað var tí, at so nógv fluttu av landinum. Tað var eisini tí eg fór. Eg kundi bara ikki ímynda mær at liva sum samkyndur í Føroyum, greiðir Meinhard St.John frá.

Hann ger greitt hvønn týdning tað hevur fyri eitt menniskja, at ikki verða góðtikið fyri tann man er.

– Tú kanst ómøguligt fungera, um samfelagið er ímóti tínum livihátti, sigur Meinhard St.John.

Hann minnist tíðina sum ungur tannáringur í Føroyum, tá ið hann mátti velja millum heimlandið og seksuellu sannføringina. Og tá tú setur tað upp soleiðis, so er lítið at ivast í, at tú noyðist at vera sannur móti tær sjálvum, og velja sannføringina framum heimlandið.

– Eg tordi ikki at koma úr skápinum í Føroyum. Eg veit ikki um eg hevði torað tað tá, um eg var verandi heima longri. Eg ivist í tí. Men nú sær tíbetur út til, at tað er broytt til tað betra, sigur Meinhard St.John.

### Liam varð borin av surogatkvinnu

Meinhard flutti í fyrstu atløgu til Danmarkar, og áðrenn rúm tíð var liðin, hitti hann núverandi mann sín Paul St.John. Tað var í Chicago, at Paul og Meinhard hittust fyri nú 15 árum síðani, og í ár kunnu teir hátíðarhalda 14 ár av hjúnarlagi. Tað var í Ráðhúsinum í Keypmannahavn, at teir báðir vóru skrásettir sum hjúnarfelagar, og eftirfylgjandi hildu teir vígslu í Helligåndskirkjuni á Strøgnum í Keypmannahavn, og á násumri var brúðarveitsla fyri familju og vinum.

Fyrstu mongu árini av hjúnarlagnum hjá Meinhard og Paul var eitt fløkjumál, sum fylti nógv. Teir ynsktu sær børn, men tað er ikki bara sum at siga tað.

Tað tók mong ár, men fyri seks árum síðani kom lítli Liam til heimin. Liam er biologiski sonurin hjá Paul St.John, meðan teir báðir fungera sum foreldur at dreinginum.

Liam varð borin í heim í Kanada, meðan báðir páparnir vóru hjá. Ein sokallað surogatkvinna bar Liam og føddi hann, og eftir at páparnir kliptu nalvastreingin var nýføðingurin leiddur heim til Paul og Meinhard.

– Tað var so fantastiskt at fáa Liam eftir at hava brennandi ynskt hann í fleiri ár, greiðir Meinhard St.John frá.

Teir fluttu til San Francisco við unga dreinginum og hava síðani virkað sum ein púra vanlig familja.

Paul starvast sum varastjóri í stórari KT fyritøku og tí ferðast hann nógv og arbeiðsdagarnir gerast langir. Meinhard er sjónleikari og hjá honum eru arbeiðstíðirnar meira fleksiblar. Tað hevur so viðført, at Meinhard er tann, sum er heima við unga Liam. Og tá ið tað gerst trupult orsaka av arbeiði, traðka foreldrini hjá Meinhardi til.

– Tað er púra óspennandi. Vit liva akkurát sum allar aðrar barnafamiljur, sigur Meinhard St John.

### Hugburðurin hevur alt at siga

Fyri okkum her í Føroyum er hetta



*»At fólk elska hvønn annan og fáa somu rættindi til at elska hvønn annan, kann ongantíð vera nakað ringt«*

*Meinhard St.John*







– Eg síggi meg sjálvan sum ein kristnan mann. Eg eri doyptur, fermdur og giftur og eg havi altíð rindað kirkjuskatt. Men mátin Guds orð er brúkt sum eitt vápn, ein hóttan móti øðrum menniskjum, líkist ongum, sigur Meinhard St.John

PRIVATMYNDIR

við samkyndum hjúnarløgum og børnum hjá samkyndum nakað relativt nýtt og forkunnugt. Tað halda vit í øllum førum. Og vit hoyra javnan argumenti um, at tað er synd fyri børn hjá samkyndum, tí tað er ónatúrligt at hava tvey foreldur av sama kyni. Men spyrt tú Meinhard er hetta nakað fjas.

– Also børn hava einans tørv á tryggleika og kærleika. Og eg vænti tað eru fá børn, sum eru so ynskt sum Liam. Vit hava stríðst fyri at fáa hann til okkara, og vit elska hann treytaleyst. Hvussu kundi tað verið ónøktandi, spyr Meinhard St John.

Ræðumyndirnar úr Føroyum eru særandi og skakandi fyri St.John barnafamiljuna í San Francisco.

– Liam er ein púra avbalanseraður og fittur drongur. Vit ganga við honum til fótbólt og svimjing. Vit eru til foreldrafundir, vit eru í kirkju hvønn sunnudag, vit eru á allar mátar eins og øll onnur. Og sonur okkara er sera væl fungerandi, sigur Meinhard St.John.

Í California er als einki óvanligt ella forkunnugt í, at eitt barn hevur tvey foreldur av sama kyni. Eingin nevnir tað, eingin diskriminerar orsaka av tí, og eingin metir tað óvanligt.

– Kirkjan her tekur so hjartaliga væl ímóti okkum, og eingin hyggur skeivt uppá okkum orsaka av okkara seksuellu sannføring. Og tað merkir eisini, at okkara sonur ikki verður ávirkaður av ræðumyndunum ella fordómunum, tí eingin heldur tað vera løgið her. Kanska er tað tí, at hetta er eitt nógv størri og fleirmentað stað, men eg haldi eisini hugburðurin generelt bara er øðrvísi til samkyndleika, sigur Meinhard St John.



## Harmur um viðmerkingarnar

Meinhard St.John og familja hansara vitja javnan í Føroyum og hava sterkt tilknýti til oyggjarnar framvegis. Og hóast viðgerðin av broytingum í hjúnabandslógini endaði júst so, sum Meinhard ynskti, so vóru viðmerkingarnar á sosialu miðlunum og frá tingsins røðarapalli særandi.

– Eg síggi meg sjálvan sum ein kristnan mann. Eg eri doyptur, fermdur og giftur og eg havi altíð rindað kirkjuskatt. Men mátin Guds orð er brúkt sum eitt vápn, ein hóttan móti øðrum menniskjum, líkist ongum, sigur Meinhard St.John.

Á netinum og í politiska orðaskiftinum hava fólk fegnast um broytingarnar í hjúnabandslógini og tey hava funnist at lóggevandi valdinum. Summi eru glað, onnur kedd, og soleiðis vil tað vera. Men harfrá og til at niðugera ein samfelagsbólk er ein stórur munur, heldur Meinhard.

– Føroyska samfelagið fer ikki at detta sundur nú, tí at øll kunnu ganga saman í hjúnarlag. At fólk elska hvønn annan og fáa somu rættindi til at elska hvønn annan, kann ongantíð vera nakað ringt, heldur Meinhard St.John.

Politikararnir skulu verja og umboða øll í samfelagnu. Vit eru sjálvandi ein kristin tjóð, men trúgvin og lóggávuverki er hvør sítt.

– Um kristnir føroyingar halda hetta vera ein hóttan móti Gudi og kristnu trúnni, so haldi eg tey hava misskilji, hvat kristindómurin í veruleikanum er. Vit eru øll skapt av Gudi og kristindómurin er júst kærleiki, sigur Meinhard St.John.

Hann er sannførdur um, at tá ið støvið hevur lagt seg eftir hetta stríðið um hjúnabandslógina, so fara føroyingar at síggja, at hendan broytingin ikki kostar nakað á kristiligu kontoini, og at hetta í veruleikanum er ein sigur fyri komandi ættarlið.

– Føroysk børn fara framyvir at vaksa upp í einum rúmligum samfelag, sum ikki dømir onnur, og tað er ein gáva at geva víðari, heldur Meinhard St.John.

Børn eru jú ikki forprogramerað til at døma hendan ella handan liviháttin. Tað er nakað, sum nærumhvørvið leggur í tey. Og nú sleppa tey undan at fáa lagt í beinið, at samkyndleiki er av tí ónda.

– Eg vóni veruliga, at foreldur taka til eftirtektar, at børn verða formað av tí, sum tey hoyra heima í stovunum. Tað er har, at fordómar og fordøming føðist, heldur Meinhard St.John.

Fyri Meinhard og Paul St.John er tó eingin ivi um, at samkynd foreldur eru minst líka væl egnað til at uppala, sum hinskynd foreldur. Og áðrenn alt ov leingi fer ungi Liam at fáa eina systur ella ein beiggja. Eingin ivi er um, at komandi St.John barnið fer – eins og stóribeiggin – at verða uppalt við kærleika og rúmligheit fyri eyga.

BARBARA@SOSIALURIN.FO